

*Ljómur tók seg væl út í Listaskálanum, har tey sungu leygarmorgunin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ljómur ljómaði í Listaskálanum

**Um vikuskiftið vóru seinastu tiltøkini á ársins Listastevnu. Í sambandi við hetta var kirkjukórið Ljómur úr Vági rættiliga í eldinum**

KÓRSANGUR
*Snorri Brend*

Havn: Leygardagn klokkan 16 fór Kirkjukórið Ljómur enn eina ferð á pall at framføra brot úr sangskrá síni. Hetta var samstundis triðja framførslan hjá kórinum hetta vikuskiftið.

Tey vóru á palli í Hvalbiar kirkju í fríggjakvøldið, og aftur í Listaskálanum í Havn leygarmorgunin, og skuldu aftur seinnapartin henda sama dagin framføra nakrar av sangum sínum í Fríðrikskirkjuni á Toftum. Ljómur er gamalt, men gott kirkjukór, sum hevur 66 ár á baki. Í summar vóru tey á kórferð heilt har suðuri í Spanien, men um vikuskifti fingu so fyrst hvalbingar, síðani havnarfólk og at enda toftafólk høvið at hoyra kórið syngja.

Í løtuni er danin Dorthe Tilma kórleiðari.

## Bárður og einabúgvin

**Navnframi føroyski myndamaðurin Bárður Eklund hevur havt eina ógvuliga áhugaverda myndaframsýning í smiðjuni í Lítluvík í sambandi við Listastevnuna**

LISTASTEVNAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Framsýningin hjá Bárði Eklund er ein myndarøð, har føroyski myndamaðurin hevur verið og vitjað 90 ára gamla einabúgvan Svend, sum býr einsamallur í einum gomlum, niðurslitnum húsum beint við Gudenánna í Jútlandi.

### Sorg køvdi lívsgleðina

Søgan um Svend byrjar undir øðrum heimsbardaga, tá ið Svend og unnusta hansara, Karen, keypa húsini við ánna. Karen, sum var virkin í donsku mótstøðurørsluni, verður tó skotin og doyr, og tá ið tað hendir, fellur Svend fullkomiliga í fátt.

Svend er ongantíð komin fyri seg eftir deyða Karens, og hann hevur ongantíð gjørt nakað sum helst við húsini, sum tey keyptu saman á sinni. Tað merkir, at húsini framvegis standa uttan nakra vesið til dømis og ikki hava vatn lagt inn, og alt møguligt órudd hópar seg upp bæði innan og uttan.

Í myndum sínum lýsir Bárður Eklund gamla einabúgvan og heimið hjá honum, og hvussu gerandisdagurin hjá Svend er í dag.

Á myndunum sæst, hvussu Svend situr kroystur millum alt møguligt órudd, men eisini nógvar lutir, ið hava nógv at siga fyri hann. Eitt nú mynd av Karen, ið var dansigenta. Somuleiðis er ein rúgva av útstappaðum fuglum partur av heiminum hjá Svend. Hetta eru fuglar, sum Svend sjálvur hevur fangað og stappað út.

Myndirnar vísa eisini, at tíðin ikki hevur so nógv at siga hjá Svend, tí á borðinum og á vegginum eru tað avísbrot úr sjeytiárunum, ið eru at síggja.

Myndarøðin hjá Bárði Eklund var spennandi, og áhugavert var at síggja, hvussu evnaríki myndamaðurin hevði valt at fáa samspæl millum motiv og ljós.

## Smúkkur, klæðir og annað úr útnorðuri

**Í sambandi við Listastevnuna hevur ein framsýning við ymiskum sniðgevum úr útnorðuri verið í Müllers Pakkhúsi. Forvitnisliga framsýningin vísti eitt nú nakað av tí besta innan føroyskt klædnasnið**

LISTASTEVNAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Framsýningin ber heitið Transform, og hon hevur longu verið sýnd fram aðrastaðnis. Á framsýningini verður ljós sett á nútímans sniðgeving úr Íslandi, Grønlandi og Føroyum.

### Hugtakandi føroyskt klædnasnið

Eitt tað mest hugtakandi á framsýniningini í Müllers Pakkhúsi var at síggja verkini hjá teimum føroysku klædnasniðgevunum. Sniðgevarar sum Elisa Heinesen, Guðrun og Guðrun, Borgný Dam Patursson og Barbara í Gongini kenna føroyingar rættuliga væl, meðan Annika Heinadóttir, Malan á Lofti, Svanhild Strøm og Anna Kirstin Bæk eru meiri óskrivaði bløð millum føroyingar.

Felags fyri øll føroysku verkini var, at tey fyrst og fremst vóru gjørd úr tilfari, ið vit hava her í Føroyum. Her verður hugsað um ull og skinn fyrst og fremst, men í onkrum einstakum verki var fiskaskræða eisini nýtt.

Føroysku verkini vóru ógvuliga spennandi og nýskapandi, og stuttligt var millum annað at síggja tær mongu taskurnar hjá Annu Kristinu Bæk, har tað var ógvuliga týðuligt, at sniðgevin hevði fingið íblástur frá William Heinesen, sála.

### Íslendskar smúkkur

Íslendski parturin av framsýningini vóru verk av íslendskum gull- og silvursmiðjum, og tað er einki at taka seg aftur í, at talan var um prýðislutir á hægsti stigi, ið íslendsku smiðirnir høvdu tilevnað.

Íslendingar hava altíð verið kendir fyri at verða rættuliga eksperimenterandi, og listin hjá teimum er eisini prógv um hetta. Hóast fleiri av verkunum á framsýningini tóktust klassisk, so sást tú eisini heilt nógvar prýðislutar, har ikki kann sigast annað, enn at talan var um ógvuliga eksperimenterandi verk.

Grønlendska íkastið til Transform-framsýningini var eisini spennandi. Eitt sindur var av tí siðvandu grønlendsku listini við verkum, sum vóru gjørd úr ymiskum steinasløgum og úr beini.

Sniðgevin Else Møller hevði eisini ein kjóla við á framsýningini, ið prógvaði, at grønlendingar eisini eru frammalaga á hesum øki.

Framsýningin í Müllers Pakkhúsi var spennandi og øðrvísi, og fyrireikararnir av Listastevnuni siga, at nógv fólk vitjaðu framsýningina, og at talan var um bæði føroyingar og útlendingar.